# Hugtakandi løta við Ettu Cameron

UMMÆLI
*Petur Zachariassen*

Full høll og møguliga ein lítil spenningur í luftini fyri at hoyra góðan black-gospel tónleik var tað, sum møtti mær tá eg saman við konuni setti meg á fremsta rað í Norðurlandahúsinum at lurta eftir Ettu Cameron og United Voices.

United Voices byrjaði at syngja undir leiðslu av Sigrið Rasmussen og byrjaðu tey við tveimum góðum sangum, sum vóru álikt black-gospel tónleiki og hetta megnaðu tey bara heilt væl. Serliga kann sigast, at Heini Lützen við sínum uppíleggingum megnaði at fáa hetta at ljóða sum ektaður black-gospel...synd at Heini ikki hevði annan húðalit her, tí so hevði tað eisini sæð ekta út....men flott av Heina.

Tveir teir síðstu sangirnir, sum United Voices sungu sjálvi, vóru friðaligir sangir og serliga tann síðsti sangurin var ein gamal føroyskur sálmur, og her haldi eg, at valið heldur skuldi verið at sungið meira black-gospel sangir, tí hesin seinasti haldi eg fekk stemningin, um tað var nakar, at falla heilt. Tá tey vóru liðug at syngja, fóru tey av pallinum og so bleiv greitt frá, hví henda konsertin var skipað. Hetta var fyri at stuðla arbeiðinum hjá ADRA at byggja hús í Kongo til heimafturvendar familjur ella tey, sum als einki eiga. Sera rørandi at síggja myndir frá arbeiðinum í Kongo. Vónandi vóru fleiri, sum keyptu eini hús, sum blivu seld fyri einans 3200 kr. Við hesum fekk ein familja eini hús, har tey kundu flyta inn í uml. 9 mánaðir eftir at byrjað verður uppá húsið. Fyllast kundi út á pappír (bindandi), um ein vildi keypa hús og so hevði ein møguleika eisini at seta egið navn ella velja eitt navn til húsið. Síðani verður mynd tikin av húsinum og familjuni, sum kemur at búgva í húsinum við einari talvu við síðuna av har stendur á hvør familjan er og hvussu húsið eitur. Myndin verður so send tí ella teimum, sum hava goldið fyri húsið. Sera áhugavert og ein gleðisgerð.

Meðan hetta gekk fyri seg, har eisini innsavnan av peningi fór fram, sat pianisturin hjá Ettu og spældi. Sera gott avrik hjá honum og flott at hoyra. Her kann eg eisini bert viðmerkja at tónleikurin hjá United Voices við Gunnar Guttesen á klaver var sera flottur. Gunnar er sera evnaríkur og gjørdi eitt sera gott avrik í sínum klaverspæli. Flott.


*Myndin er frá konsertini við Ettu Cameron og United Voices í Fuglafirði.*

*Mynd Høgni Thomsen*

Etta kom so inn á gólvið og við klaverspælinum megnaðu tey bæði sera gott at gera eitt gott avrik. Etta, sum er komin upp í árini, megnaði sera væl at framføra og er hennara rødd sera góð til at syngja black-gospel. Hon sang sera gott og samanspælið við klaverspælaran var sera gott.

Tað, sum var hugtakandi, var tá Etta sang tann eina sangin og kórið, sum hevði verið til workshop í vikuskiftinum, kom inn á pallin oman gjøgnum báðar trappurnar í høllini. Frá at vera uml. 20 í United Voices, so komu bæði United Voices og uml. 50 onnur inn á pallin at hjálpa Ettu at syngja. Hetta haldi eg riggaði væl. Sjálvandi hoyrdi ein, at hetta ikki var eitt "kór", men ein workshop bólkur. Teir sangir, sum Etta sang saman við hesum kóri, vóru kendir sangir sum t.d. Amen, When the saints og This little light of mine. Stuttligt hjá teimum heilt ungu at verða við í einum slíkum tiltaki. Av hesum uml. 70 menniskjum vóru bert 8 menn, harav 6 sungu við United Voices. Her er mangul uppá mansrøddir, men sum skilst, so er tað trupult at fáa menn at syngja við.

Bara fyri at summera so haldi eg at hetta var ein góð konsert og frøddi tað meg at hoyra so gott klaverspæl saman við Ettu og United Voices.

### Samrøða við Ettu Cameron týsdag

Lesið eisini samrøða við Ettu Cameron og ummæli av konsertini í Mentanarhúsinum í Fuglafirði í týsdagsblaðnum.

# ADRA seldi 23 hús leygarkvøldið

**Konsertirnar við Ettu Cameron vóru til frama fyri afturvend flóttafólk í Kongo. Føroyingar hava møguleika at keypa eini hús í Kongo til flóttafólkini fyri einans 3.200 krónur**

STUÐULSKONSERT
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Tað var hjálparfelagsskapurin ADRA, sum skipaði fyri konsertunum við Etuu Cameron leygarkvøldið og sunnukvøldið

Alt yvirskotið fer til at keypa hús í Kongo til afturvend flóttafólk. Umstøðurnar í Kongo hava leingi verið ótolandi, og tí rýmdi nógv av landinum fyri nógvum árum síðani. Nú byrja hesi fólkini tó at venda aftur, men tey hava einki hús at koma heim til. Hesum ynskir ADRA at hjálpa við.

– Konsertin í Norðurlandahúsinum gekk sera væl, og vit seldu heili 23 hús hetta kvøldið, umframt at vit savnaðu 15.000 krónur inn. Sunnukvøldið savnaðu vit eisini nógv inn, og vit seldu eisini nøkur hús, men eg veit ikki júst hvussu nógv, segði ein umboðsmaður fyri ADRA eftir konsertina sunnukvøldið.

Áhoyrararnir til konsertirnar hjá Ettu høvdu møguleika til at keypa eitt hús í Kongo til afturvendu flóttafólkini fyri einans 3.200 krónur. Keyparin sleppur sjálvur at gera av, hvussu húsið skal eita.

ADRA móttekur nógvan stuðul frá DANIDA, sum er menningarhjálpargrunn urin hjá danska statinum. ADRA er við í nógvum verkætlanum kring heimin. ADRA er bygt uppá tað kristna grundarlagið, og tað hevur verið tætt knýtt at adventistakirkjuni. Nú er tað tó ein sjálvstøðugur felagsskapur, og teir vilja hjálpa uttan mun til, hvørji fólkini eru, og hvørja trúgv, tey hava.




# Hægri renta til sethús

**Úrslitið hjá Suðuroyar Sparikassa er næstan trýfaldað úr 782.000 kr. í 2005 til góðar 2,2 mió. kr. í fjør. Sparikassin roknar við, at rentan fer at hækka uppaftur meiri í ár**

ÁRSROKNSKAPUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Sparikassin hjá suðuroyingum, sum eisini hevur deild í høvuðsstaðnum, hevur bøtt munandi um úrslitið frá 2005 til 2006.

Í fyrraárið hevði Suðuroyar Sparikassi eitt avlop upp á 782.000 kr., men í 2006 er hetta næstan trýfaldað upp í góðar 2,2 mió. kr.

– Ársúrslitið er batnað munandi, sjálvt um árið hevur verið sermerkt av harðari kapping millum peningastovnarnar á týdningarmesta marknaðinum hjá Sparikassanum, sum er sethúsafígging til privatkundar, skrivar Suðuroyar Sparikassi í tíðindaskrivi.

Víðari stendur, at »Í kappingini varð 1. veðrættarrentan lækkað frá 4,25 til 3,45 prosent, og fíggingarmynstrið broytt við millum øðrum longri avdráttartíðum. Hesar broytingar hava ført til øktar húsaprísir og hava sannlíkt eisini økt um privatnýtsluna.«

Sparikassin væntar, at rentustøðið fyri 1. veðrætt fer at hækka upp í 5,75 prosent í ár.

Nettoinntøkurnar hækkaðu við knøppum 2,6 mió. kr. úr 14,9 mió. til slakar 17,5 í 2006. Hetta er ein framgongd upp á 17,2 prosent.

Avgjaldsinntøkurnar eru øktar frá sløkum 2,3 til 3,7 mió. kr., sum svarar til eina øking upp á 60,8 prosent. Ein stórur partur av hesi øking stava frá, at Sparikassin er byrjaður at krevja inn avgreiðslugjøld.

Kursvinningurin av virðisbrøvum og gjaldoyra upp á 545.000 kr. var nakað lægri enn í 2005, tá hann var 664.000 kr.

Á útreiðslusíðuni eru lønir til starvsfólk lækkaðar við trimum prosentum niður í 7,5 mió. kr., meðan aðrar útreiðslur eru hækkaðar úr 6,7 upp í 8,1 mió. kr. Hækkingin stavar millum annað frá, at Suðuroyar Sparikassi nýtti uttanhýsis serkunnleika í samband við umskipanina til partafelag og hevði byrjunarútreiðslur í sambandi við at lata upp deild á Tvøroyri, og at deildin í Havn flutti í nýggj hølir.

Skatturin av avlopinum hjá Suðuroyar Sparikassa fyri 2006 er roknaður til 582.000 kr. í mun til 224.000 kr. árið fyri.